skemt

# Fýra ella fimm?




Hetta skelti boðar frá, at 4 fruktir fáast til ein góðan prís. Men har standa bara fýra ymiskar fruktir á skeltinum, men kanska hava vit misskilt tað heila – við vilja...

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Fekk hann ilt?**
Christian rakti stongina
Sosialurin

**Ovfarin av yvirskrift**
Legg til rættis at gerast ovfarin
Dimma

**Umsíðir!?**
Umsitingin í arbeiðshandskarnar
Norðlýsið

**Einki skrásett parlag norðanfyri**
Klaksvík og Svínoy undirskriva hjúnarlag í morgin
Olivant

**Nýtt, nýtt!**
Flogfør á klænkikur
Olivant

**Ein er ov lítið**
Tveir djúpvatnstrolarar søkja um at sleppa at partrola
Útvarpið



# Soleiðis forðar tú stuldri

Eigarin av hesum bilinum vil tryggja sær, at eingin fer avstað við honum, so hann hevur gjørt sær sína heilt egnu fellu. Spurningurin er bara, hvør í allari víðu verð skal tíma at taka hendan bilin



# Tað var hasin

- Hygg hasin har. Hatta var hann, sum royndi at spyrja meg okkurt. Eg læt bara akkurát sum einki – eg tími ikki at snakka við blaðfólk. Tey kunnu snakka við Magna ella Ólavur.

## Leyst og fast um stórt og smátt

Er tað eingin sum er AL-goystur aftaná umhvørvisráðstevnuna?
Dálking = AL-gur í sjónum?

Al Gore vunnið ein Oscar! Tað má verða fyri ein STUMfilm?

Bill var nú eina ClinTonn betri enn Al!

Ráðstevnan á Christiansborg hevði verið ein ordans BLOKK-buster!

Tobbi fær so Napoleons-hatturin passar!

Vónandi kemur vargur ikki í seyðin á Lítlu Dímun. Tobbi kemur so út ein túr!




# Marathon-Batman

Farna vikuskiftið var London Marathon, og fleiri enn 40.000 rennarar vóru við í kappingini. Millum teirra vóru eisini Batman og Robin, sum hendan dagin høvdu sett batmobilin eftir heima og brúktu beinini.